gult cyan magenta svart



# Sjálvsognarstovnur skal reka Atlantis

*Klaksvíkar býráð samtykti hósdagin, at ein nýggjur sjálvsognarstovnur skal yvirtaka og reka mentanarhúsið Atlantis*



EYÐUN KLAKSTEIN

Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík hevur síðani umvælingina í 1997 ligið tungt í sjónum, hóast tað ongantíð rættiliga er sokkið, soleiðis sum oyggin, sum tað er uppkallað eftir, gjørdi á sinni.

Men nú ætlar Klaksvíkar býráð, at ein loysn skal finnast á fíggjarligu trupulleikunum hjá Atlantis, og at húsið skal fáast at virka betur aftur.

Raksturin og virksemið í húsinum hevur verið tyngt av stórari skuld, sum millum annað hevði við sær, at biografvirksemið í húsinum mátti steðga, og at tað ikki bar til at halda fram við einum fulltíðarleiðara í húsinum.

Seinastu tvey árini hava onkur hissini mentanartiltøk verið í húsinum, men tað hevur fyri tað mesta verið Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum hevur brúkt húsið.

**Endalig loysn skal finnast**

Klaksvíkar býráð samtykti á fundi hóskvøldið uppskotið, sum mentanarnevndin og umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu høvdu snikkað saman.

Hetta uppskotið leggur nú upp til eina varðandi loysn á fíggjarligu trupulleikunum hjá Atlantis.

Ein nýggjur sjálvsognarstovnur skal nú yvirtaka og reka Atlantis, og ein trímannanevnd skal veljast fyri hendan stovn. Í hesa nevnd skal býráðsformaður velja ein lim, Klaksvíkar Sjónleikarfelag ein lim og Norðoya Sparikassi, sum hevur fíggjað umbyggingina av Atlantis, skal velja ein lim.

Ætlanin er so, at nevndin skal seta ein dagligan leiðara í Atlantis, og nevndin fær eisini til uppgávu, at finna eina loysn á fíggjarligu trupulleikunum. Í løtuni er skuldin í Atlantis 1,9 milliónir krónur, og hendan skuldin tyngir raksturin av húsinum.

- Nú er tað upp til sjálvsognarstovnin at fáa Atlantis at virka aftur sum eitt veruligt mentanarhús, og eg eri vísur í, at hetta er rætta loysin, sigur Jógvan Lutzen, formaður í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar býráði.

- Ætlanin var upprunaliga, at tað umbygda Atlantis skuldi verða eitt mentanarhús, men húsið hevur ikki livað upp til hetta endamál higartil. Nú má tað fáast at virka, og tað sum skjótast, sigur Jógvan Lutzen.

Hann dugir ikki at siga, nær nevndin fyri sjálvsognarstovnin verður vald og fer at virka, men hann vónar, at hetta verður gjørt sum skjótast.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

# Barsskor maskinskaða

*Síðani fríggjadagin hevur Alpha Pilot røkt siglingina millum Klaksvík og Kalsoynna*

EYÐUN KLAKSTEIN



Fyrrapartin fríggjadagin fekk Barsskor maskinskaða undir einum túri til Kalsoynna, og síðani hevur strandfaraskipið ligið við bryggju í Klaksvík.

Neyðugt var at sleipa Barsskor aftur til Klaksvíkar, og tað órógvaði siglingina millum Kalsoynna og Klaksvík nakað fríggjadagin.

Men nú røkir Aplha Pilot hjá Torleifi Sigurðsson siglingina millum Klaksvík og Kalsoynna, og tað fer báturin at gera, til Barsskor er umvældur. Barsskor liggur nú á bedingini í Klaksvík, har menn kannað brekið.

**Ternan I sigldi eisini**

Stórt hátíðarhald var annars á Syðradali um vikuskiftið, tí ein nýggjur minnisvarði varð avdúkaður. Hesum hevði Strandferðslan tó tikið hædd fyri frammanundan, og Ternan I - við Sámali Peturi í Grund á brúnni - sigldi nakrar túrar millum Lorvík, Kalsoynna og Klaksvík leygardagin.

Barsskor, sum varð bygdur í 1929, tekur 50 ferðafólk, meðan Alpha Pilot bert tekur helmingin. Strandferðslan heldur tó ikki, at hetta er nakar trupulleiki, tí Alpha Pilot siglir væl skjótari enn Barsskor, og tí ber til at gera eykatúrar, um tað verður neyðugt.

Sambært ferðaætlanini brúkar Barsskor 20 minuttir úr Klaksvík og til Syðradal. Alpha Pilot siglir teinin upp á eitt korter. Tað eru millum tveir og fýra túrar millum Klaksvík og Kalsoynna hvønn dag.

# Bróta nú tøgnina á internetinum

*Landsstýrið fer nú taka internetið í brúk fyri at kunna fólk um grindadráp*

EYÐUN KLAKSTEIN




Landsstýrið ger nú landgongd á internetinum, tá tað snýr seg um grindadráp.

Millum tær mongu heimasíðurnar um vinnumál, fullveldi og mentamál, verður nú umsíðir ein síða um grindadráp at finna.

- Internetið skuldi fyri langari tíð síðani verið tikið í nýtslu í hesum málinum, men tað hevur strandað upp á arbeiðsorku, sigur Kate Sanderson, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni.

Hon sendi í gjár út tíðindabræv til miðlar og fólk í Føroyum og útlandinum um, at landsstýrið nú kunnar um grindadráp á internetinum, har milliónir av fólkum kring allan heim hvønn dag leitað eftir upplýsingum.

- Hetta verður eingin síða við propaganda, men ein síða við vanligari kunning um grindadráp, sigur hon.

**Sjálvandi internet**

At Paul Watson nú er í Føroyum hevur skundað undir arbeiðið at gera grindasíðuna á internetinum, og Kate Sanderson sigur, at talan er um eina fyribilssíðu, sum nú er løgd út á netið.

- Í løtuni er tað mesta tekstur, sum liggur úti, men vit ætla at leggja myndir og annað út eisini, sigur hon.

- Tað er rættiliga upplagt at brúka internetið til at kunna um grindadráp, tí fólk í útlandinum kunna á tann hátt sleppa lætt og skjótt fram at upplýsingum um grindadráp. Trupulleikin við internetinum er tó, at tað er ein passivur miðil, og tí mugu vit kunna fólk um, at vit kunna um grindadráp á netinum, sigur Kate Sanderson.

Felagsskapurin hjá Paul Watson, Sea Shepherd, nýtir eisini internetið í sínum átaki ímóti føroyska grindadrápinum.

gult cyan magenta svart



# Vrakaður av sínum egnu

*Signar á Brúnni kennir seg settan til viks av sínum egnu, nú Tjóðveldisflokkurin hevur valt annan landsstýrismann*

JOHN JOHANNESSEN

Tjóðveldisflokkurin hevur brotið avtaluna, um at eingin nýggjur landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum skuldi setast, fyrr enn kaningarstjórin var liðugur at kanna embætisførsluna hjá Signari á Brúnni.

Hetta staðfestir Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður, nú tað er greitt, at Tórbjørn Jacobsen fyrsta dagin verður settur sum nýggjur landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum.

Signar á Brúnni vísir á, at tað varð avtalað í Tjóðveldisflokkinum og í landsstýrinum, at hann skuldi fara á síðulinjuna, meðan málið varð kannað. Men tá kanningin var liðug, skuldi hann koma aftur í landsstýrissessin. Hesa avtalu metir Signar á Brúnni nú, saman við fleiri øðrum avtalum, vera brotna.

**Kanningin drigin út**

Signar á Brúnni sigur grundgevingina frá Tjóðveldisflokkinum fyri at seta nýggja landsstýrismann nú vera, at tað er vorðið ov tungt hjá flokkinum at umsita trý stýri við tveimum landsstýrismonnum í so drúgva tíð.

Upprunaliga var ætlanin nevniliga, at kanningarstjórin skuldi vera liðugur 30. juni, og skuldi Signar á Brúnni tá taka við aftur landsstýrissessinum, varð hann reinsaður.

Signar á Brúnni sigur seg væl duga at skilja, at tað í longdini ikki ber til at Høgni Hoydal skal halda fram at umsita undirvísingar- og mentamál afturat sínum egnu málsøkjum. Men hann heldur tað kortini vera eitt sindur løgi, at nýggi landsstýrismaðurin verður settur nú tað er greitt, at kanningarstjórin er liðugur at kanna embætisførslu hansara beint eftir ólavsøku.

**Kennir seg offraðan**

– Eg eri ógvuliga harmur um alla gongdina í hesum málinum, og eg kenni tað, sum eg eri offraður, sigur Signar á Brúnni.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin vísir á, at grannskoðarafrágreiðingin, sum sáddi iva um embætisførslu hansara, eisini vísti á skeivleikar í embætisførsluni hjá øðrum landsstýrismonnum, men at einki varð gjørt við hetta.

– Eg skilji ikki, at tað bert verður skotið út í flokkin, soleiðis, at bert ein verður raktur, sigur Signar á Brúnni.

**Viðgjørt út í æsir**

Signar á Brúnni vísir enn einaferð á, at áðrenn hann tók avgerðina um at veita sjónvarpinum pening uttan heimild frá løgtinginum, varð avgerðin viðgjørd út í æsir bæði millum embætisfólk í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og millum embætisfólk hjá Fíggjarmálastýrinum.

Eisini vísir Signar á Brúnni á, at landsstýrið alla tíðina væl og virðiliga varð kunnað um, hvat fór fram.

– Alt landsstýrið var samt í hesum máli. Eingin setti fingurin á nakað, eg gjørdi, sigur Signar á Brúnni.

- Fyrrverandi landsstýrismaðurin leggur afturat, at tað á einum av hesum landsstýrisfundunum varð sagt, at um tað skuldi hent, at avgerðin fór at fáa avleiðingar fyri Signar, átti hon at fáa avleiðingar fyri alt landsstýrið.

Tá so málið hevði fingið avleiðingar fyri Signar á Brúnni, hevði løgmaður sagt, at soleiðis sum hann skilti málið, var talan um »storm i et vandglas«.

Men kortini kom tað so langt, at Signar á Brúnni noyddist at fara frá av sínum eintingum, meðan málið varð kannað. Løgmaður hevði lovað honum at seta ein kanningarstjóra, men setti kortini ongan. Í staðin skuldi landsstýrismálanevndin seta ein kanningarstjóra.

Men landsstýrismálanevndin metti tað ikki vera neyðugt við nøkrum kanningarstjóra. Fyri hana var málið avgreitt.

Næsta stig var so, at 13 samgongulimir í løgtinginum skuldu heita á løgtingsformannin um at seta ein kanningarstjóra. Hetta mundi miseyndast, men at enda skrivaðu tinglimir undir áheitanina til løgtingsformannin. Tveir av tinglimunum vóru úr andstøðuni.



*Hóast Signar á Brúnni kennir seg illa viðfarnan av sínum egnu, fer hann at halda fram at arbeiða fyri politikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum*

**Heldur fram við politikkinum**

Hóast Signar á Brúnni kennir seg illa viðfarnan av sínum egnu, fer hann at halda fram at arbeiða fyri politikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum. At fáa fullveldi er eitt av hjartamálunum hjá Signari á Brúnni, og hesum ætlar hann sær at virka fyri av fullum hjarta framyvir.

Signar á Brúnni dugir kortini ikki at siga, um viðferðin, hann hevur fingið, fer at ávirka samstarv hansara við hinar løgtingslimirnar í Tjóðveldisflokkinum.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin vil ikki gera viðmerkingar til, hvussu hann metir, at nýggi landsstýrismaðurin fer at klára seg í sessinum.

# Neyðugt at seta landsstýrismannin nú

*Í longdini var tað ikki nøktandi, at Høgni Hoydal umsat undirvísingar- og mentamál umframt síni egnu málsøki. Tí valdi Tjóðveldisflokkurin, at Tórbjørn Jacobsen skuldi gerast nýggjur landsstýrismaður*

JOHN JOHANNESSEN



Tórbjørn Jacobsen varð valdur sum nýggjur landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, tí Tjóðveldisflokkurin ikki longur metti tað vera nøktandi, at Høgni Hoydal skuldi halda fram at umsita hesi málsøki umframt síni egnu.

Hetta ger formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal greitt.

Høgni Hoydal vísir á, at tað komandi tíðina er nógv arbeiði, ið skal gerast, bæði í sjálvstýrismálum og í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Tí hevði ikki borið til hjá honum at røkt sínar skyldur til fulnar.

Tá kanningin av Signari á Brúnni áður er drigin út, metti Tjóðveldisflokkurin tað ikki vera ráðiligt at rokna við, at hon fer at koma um fáar vikur, ein og lovað. Tí valdi flokkurin nú at heita á løgmann um at seta Tórbjørn Jacobsen sum nýggjan landsstýrismann.

Tjóðveldisflokkurin hevur áður lovað Signari á Brúnni, at hann skuldi koma afur í sessin sum landsstýrismaður, tá ein kanningin hevði reinsað hann. Men flokkurin metir rætt og slætt, at tað nú ikki ber til at bíða eftir úrslitinum av kanningini.

Høgni Hoydal sigur, at avgerðin er væl og virðiliga viðgjørd í flokkinum, og tí væntar hann ikki, at samstarvstrupulleikar fara at standast av henni.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum metir tað sum eina stóra avgerð, tá Signar á Brúnni valdi at fara frá fyri at vísa fyridømi, og hann er vísur í, at kanningin fer at reinsa hann.

Fleiri viðmerkingar vil Høgni Hoydal ikki gera til avgerðina.

PRÝÐISLUTIR
VIÐ MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI




SANSIR TEL 355 355

Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi røð av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 4 motiv - fleri eru at velja ímillum.

Eitt frálíkt gávuhugskot - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...

3arin

SMS · Tel 353535 · Fax 353536 · E-mail: tryarin@post.olivant.fo